# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Høvuðsvinna og útbúgving

Leingi er tað, ið væl skal vera. Tað eru nú eftirhondini út við trýati ár síðan, at tann nógv umrøddi skúlapakkin varð samtyktur á løgtingi. Hesin skúlapakki fekk eina umskiftandi lagnu og varð broyttur, í tráð við skiftandi politiskar raðfestingar. Hinvegin standa nú uppi tríggir av teimum upprunaliga fýra skúlunum, sum vóru í skúlapakkanum, og bert ein er fluttur í mun til upprunliga pakkan. Hesin skúli er Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy, sum endaði á Kambsdali. Miðnámskúlin í Suðuroy endaði í Hovi, har hann upprunaliga varð ætlaður at vera og í fyrradagin varð so nýggjur fiskivinnuskúli í Vestmanna tikin í brúk.

Uttan mun til, hvat annars verður hildið um henda gamla skúlapakka, so hevur hann ikki verið óhentari enn so, at, tá Miðnámsskúlin í Suðuroy um stutta tíð verður tikin í brúk, so hava allar útbúgvingarnar í gamla skúlapakkanum fingið nútímans og hóskandi bygningar. Til upprunaligu ætlanina hoyrdi ein skeiðsháskúli á Sandoynni, men henda ætlan var ongantíð serstakliga greið, tó so, at tann nógv umrøddi listaháskúlin á Sandi helst man vera í ætt við hesa upprunaligu ætlan um ein skeiðsháskúla. Henda ætlan eigur tí ikki at vera slept, men avvarandi myndugleikar eiga at arbeiða víðari við tí góða hugskotinum um ein háskúla fyri skapandi og útinnandi list.

Tað er í grundini margháttligt, at hóast fiskivinnan í stórt hundrað ár hevur verið okkara høvuðsvinna, hava vit onga beinleiðis útbúgving havt í landinum innan hesa vinnu. Vit hava sjálvsagt havt eina navigatións- og maskinmeistaraútbúgving á altjóða støði, men hesar útbúgvingar eru ikki spesifikt vendar móti fiskivinnuni. Men bøtt varð hetta, tá Fiskivinnuskúlin fyri tjúgu árum varð settur á stovn.

Tað eru allar góðar grundir til at ynskja øllum tilukku við tí stásiliga og funktionella bygningi, sum nú stendur í Vestmanna. Vit vita væl, at tað eru ikki húsini, sum mynda eina útbúgving. Hinvegin krevur einhvør nútímans útbúgving eitt minstamát av fysiskum karmum, um nøktandi úrslit skulu røkkast. Fiskivinnuskúlin í Vestmanna hevur ikki havt hetta minstamátið. Skúlin hevur húsast í fýra ymiskum sethúsum, sum ikki hava verið hóskandi. Umstøðurnar hava verið dømi um, hvussu vit raðfesta og hvussu lágt høvuðsvinnan hevur staðið í metum hjá myndugleikunum. Men nú er komin vend í, og í Vestmanna stendur ein hin mest bæriligi og funktionelli vinnuskúli í Norðurlondum. Hetta er sera gott, og tað er eingin ivi um, at allir føroyingar fegnast um, at tað langt um leingi eydnaðist at fáa til vega undirtøku fyri hesi frálíku verkætlan. Skúlin hevur stórar ætlanir. Hetta er gott, og vónandi fara allir partar at taka væl undir við hesum æltanum. Tað er sostatt einki at ivast í, at við nýggjum og nógv bøttum karmum fer innihaldið at gerast uppaftur betri og viðkomandi. Tað er sostatt alt, sum bendir á, at nýggi Fiskivinnuskúlin fer at verða til almikið gagn fyri fiskivinnuna á sjógvi og landi og sostatt fer nýggi skúlin væntandi at vera øllum samfelagnum til frama. Hjartaliga tilukku!

**Sosialurin**

## Tunlar uttan klandur

JÓNLEIF JOHANNESEN
Klaksvík



**Hugsjón:**
Vit byggja á eina samhaldsfasta skipan innan vegakervið. Tann berandi tankin er, at tey vegastrekkir, sum eru dagførd skulu rinda kostnaðin fyri at dagføra ótiðarhóskandi vegastrekkir.

**Ætlan:**
Vit knýta Norðoya, Vága, Norðskála og Kollfjarða tunlarnar saman í eina skipan. Skipanin skal virka á tann hátt, at bilurin bert verður skrásettur einaferð um dagin. T.v.s. at tað kostar tað sama at koyra gjøgnum allar tunlarnar, sum tað kostar at koyra gjøgnum ein.

**Grundarlagið**
Grundarlagið undir hugsjónini er at skráseta eitt stórt tal av bilum.

**Norðoyartunnilin**
Í 2008 goldu 347.199 bilar fyri at koyra gjøgnum Norðoyartunnulin.

**Norðskálatunnilin**
Vit vænta at Eysturoyggin gevur áleið tað sama av bilum sum Norðuroyggjar. 350.000 bilar koma at gjalda gjøgnum Norðskálatunnilin

**Kollfjarðatunnilin**
Norðstreymingar pendla nógv til Havnar. Siga vit, at teir telja góða helvt av Eysturoynni, er tað á eini leið. Eini 200.000 bilar. Havnamenn, sum skulu til Norðstreym ella inn í Eysturoynna verða eisini skrásettir. Eini 200.000 bilar, koma at gjalda tann vegin. Tilsaman verða tað uml. 400.000 bilar, sum koma at gjalda í Kollfjarðatunnilinum.

**Vágatunnilin**
Í 2008 goldu 288.478 bilar í Vágatunilinum.

**Tilsamans**
Leggja vit hesi tøl saman, fáa vit gjald frá 1.385.677 bilum hvørt ár.

**Vinningur:**
Seta vit gjaldið á 70 krónur gevur tað ein vinning á uml. 97.000.000 krónur. Uml. 40. mió fara til Vágatunnilin og Norðoyartunnilin. Hinar 57 mió eru beinleiðis vinningur.

**Endamálið:**
Hesar uml. 57 mió krónur skulu brúkast til ótíðarhóskandi vegastrekkir í Føroyum. Øll vita, at m. a. Er vegurin til Dals lívshættisligur. Kanska kundi henda skipan eisini skunda undir Sandoyartunnilin?

**Niðurstøða:**
Hetta er ein spennandi tanki við spennandi tølum. Eg vóni og vænti, at avvarandi mynduleikar lata onkran hyggja at hesum.

## Enn einaferð dumpaði Kringvarpið

JAN HALDANSEN

Ein nýggjur Fiskivinnuskúli er bygdur í Vestmanna og stór hátíðarløta var fyri almenninginum mánadagin kl.1500.

Tey sum høvdu tíð og kundu leggja leiðin framvið í Vetmanna vóru mong, men enn fleiri vóru til arbeiðis ella stødd aðrastanis kring landi og kundu ikki leggja leiðina fram við nýggja snotuliga skúlan hendan mánadagin.

Tí mundu tað verða mong sum kl 1900 settu seg tilrættis framman fyri sjónvarpsskýggjan, og væntaðu ein innslag um nýggja Fiskivinnuskúlan í Degi og Viku. Men øll blivu skuffaði, jú tí har var einki innslag. Henda hending var ikki stór nokk, til at Kringvarpið sendi ein upptøkumann og ein journalist norður til Vestmanna, fyri at vísa Føroya landi tann nýggja skúlan.

Dagur og Vika vildi heldur vísa gamlar myndur um Topaz máli, har jú einki nýtt var at frætta, innsløg um handlar og Norrønu og til síst um grýlur og tunnisláttur. ØLL hesi innsløg høvdu tað til felags, at tey vóru úr Havnini og tað sigur ikki so lítið um áhugan hjá Kringvarpinum uttanfyri bøgarðanar í Havnini.

Morgunsendingin hevði eitt innslag um morgunin og skulu teir hava takk fyri tað, men tá allir stovnar nú royna at samantvinna alt sum samantvinnast kann, fyri at spara um útreiðslunar, so máttu tey fólk sum taka avgerðir í Kringvarpinum fyri tíðindafluttning, verði so mikið at sær komin at tey samantvinnaðu Útvarp og Sjónvarp í hesum føri. Vit hyggjarar leggja ikki so nógv í hvør stendur aftanfyri mikrofonina, men vilja hava eina heildarmynd.

Tvørafólk vóru skuffaði tá kirkja teirra hevði ein stóran dag, her einki bleiv gjørt burturúr frá Kringvarpsins síðu. Eg haldi at fleiri við mær eru skuffaði av tykkum, við ikki at halda nýggja Fiskivinnuskúlan í Vestmanna skal hava tann stóra týdning fyri tykkara tíðindafluttning.

Nei sendi titt fleiri innsløg kopieraði frá DR ella NRK og latið journalistanar so renna runt í Havnargøtum fyri at finnað eitt innslag til Dag og Viku. Ella fari til Íslands tá teir hava trupuleikar, hetta er jú bíligast ella hvussu ????

Tað eru fólk uttanfyri Havnina sum gjalda Kringvarpsgjald, minnist til tað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.